## Cambo framvegis ”tight”

Nú meðan oljuleitingin á føroyska landgrunninum bíðar eftir næstu boringini á Williamleiðini í 2007 eru øll eygu vend móti virkseminum hinumegin markið. Her fyrst og fremst teimum trimum metingar- og avmarkingarbrunnunum á Rosebankleiðini, skamt frá markinum. Sum skilst gongur væl við at bora tann fyrsta av trimum brunnum. Men enn er ov stutt borað til at siga nakað ítøkiligt. Endamálið við hesum trimum brunnum er at vita, um oljukeldan, sum eitt oljusamtak við Chevron sum fyristøðufelag fann fyri tveimum árum síðani, er rakstrarverdug.

Hóast lítið hoyrist til tað, sum fer fram hinumegin markið, so verður oftani spurt, hvussu gongur við Cambo-oljukelduni, sum eitt samtak við Amerada Hess á odda fann fyri nøkrum árum síðani. Tað hevur ljóðað, at talan her er um eina stóra oljukeldu, men hon hevur so havt status sum ”tight” higartil. Sosialurin hevur spurt kunningarstjóran hjá Amerada Hess, Andy Mitchell, hvussu støðan er við Cambo. Hann sigur, at hesin brunnurin enn hevur ”Tight” status, og tí verða ongir upplýsingar latnir almenninginum. Vit hava tó skilt á keldum, at tað verður leitað eftir boripalli at bora ein avmarkingar- og metingarbrunn. Cambo liggur rættiliga tætt upp at føroyska markinum, og tí hevur henda keldan stóran áhuga fyri føroyskar oljumyndugleikar.

# Bergið umhugsar nú at byggja nýtt trolvirki í Hvalba

**- Men byggiætlaninar hanga saman við, hvørt vit kunnu vænta okkum ein betri tunnil ella ikki. Røkist einki fyri einum meira tíðarhóskandi tunli innan eini 2-3 ár, er ikki óhugsandi, at eitt nýtt trolvirki verður bygt á Tvøroyri í staðin, sigur stjórin í Trolvirkinum Berginum í Hvalba, Dan Thomsen**

BYGGIÆTLANIR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sp/F Trolvirkið Bergið húsast í gomlum og ikki serliga tíðarhóskandi hølum á bryggjuni í Hvalba.

Arbeiðshølini eru umleið 216 fermetrar í tveimum hæddum. Felagið hevur søkt Hvalbiar kommunu um loyvi at taka verandi bygning niður og byggja ein nýggjan, størri og meira tíðarhóskandi bygning á økið í staðin.

Dan Thomsen, stjóri, sigur, at teir kundu hugsað sær at bygt ein bygning, sum er einar 40x17 metrar í tveimum hæddum.

- Vit vita, at føroyski trolmarknaðurin er avmarkaður – og hann verður ikki størri, nú tríggir útbjóðarar eru, samstundis sum fiskidagarnir hjá skipunum ár undan ári verða skerdir.

Stjórin sigur, at felagið eisini hugsar um útlendska marknaðin, men til tess hevur felagið brúk fyri meira nútíðarhóskandi arbeiðsumstøðum.

### Kortini ivasamt

- Men tað er ikki vist, at nýggja trolvirkið verður bygt í Hvalba. Hetta veldst eisini um, hvat vit í framtíðini kunnu vænta okkum av tunlinum, sum er fullkomiliga ótíðarhóskandi og elvir okkum til nógv eyka stríð - og kostar okkum eyka pening í flutningi gjøgnum eitt heilt ár.

Hann vísir á, at tá ið felagið fær vøru við skipum, sum koma á Tvøroyri, er vøran vanliga í bingjum, men hesar bingjur sleppa ikki gjøgnum tunnilin og norður til Hvalbiar.

- Tí noyðast vit at flyta vøruna norður í smáum bilum. Hetta merkir, at flutningurin bæði tekur longri tíð, kostar okkum óneyðugt stríð og pening.

Stjórin vísir á, at tað er ikki bara trolvirkið, sum kennir sviðan av vánaligu farleiðini, men so sanniliga eisini annað vinnulív uppi á landi í Hvalba – umframt fólkið í økinum sum heild.

- Verandi tunnil er einki at bjóða fólki í 2006, nú onnur økir í landinum, sum vit her norðuri skulu kappast við, hava fingið gott samferðslunet.

Hann sigur, at røkist einki fyri einum betri tunli innan eini 2-3 ár, umhugsar Trolvirkið Bergið rættiliga at flyta virksemið til Tvøroyrar í staðin.

- Vit noyðast eisini eins og øll onnur at hugsa í krónum og oyrum, um virksemið skal rekast rationelt, leggur Dan Thomsen aftrat.

### Ístak í oynni

Stjórin vísir á, at nú felagið Ístak er í oynni og ætlandi verður liðugt við at bora í desember, hevði hann hildið tað verið náttúrligt, at maskinurnar vórðu fluttar norður til Hvalbiar, soleiðis at ein betri tunnilsloysn kundi verið í ljósmála innan eini 2-3 ár.

- Í mun til, hvussu samfelagið hjá okkum nú er útbygt á samferðsluøkinum, føla vit okkum her suðuri sum rættiligir eftirbátar. Eg stúri fyri, at vit hava einki vinnulív eftir uppi á landi um okkara leiðir um eini 10 ár, um vit ikki fáa eina betri og varandi tunnilsloysn í bræði.

Hann sigur, at eitt av feløgunum, sum hevur fiskavirkisvirksemi í Hvalba, herfyri læt frætta, at felagið noyðist av við einar 400.000 krónur eyka um árið, tí farleiðin er so óhøglig og ótíðarhóskandi.

Ætlanin er at fara undir toskaaling í Hvalba, og eisini er ætlanin at byggja ein eftirskúla í økinum.

- Eg haldi, at tey fólkavaldu her suðuri áttu at trýst meira á játtandi myndugleikarnar millum valini – og ikki bara, tá ið val stundar til, og teir ynskja okkara atkvøðu. Tað gevur okkum onga betri tunnilsloysn, leggur Dan Thomsen, stjóri á Trolvirkinum Berginum, dent á.




*Myndin er tikin á Fish Fair næstsíðsta summar á básinum hjá Trolvirkinum Berginum. Gestirnir eru fiskimálaráðharrin og konan*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Trolvirkið Bergið

**- Eg haldi, at avgerðin um at leggja saman við P/F Vónini fyrst í hesum árinum, var skilagóð. Eitt slíkt samstarv tænir okkum ikki minst í felags innkeypi, soleiðis at rávøran verður bíligari, sum aftur kemur skipunum til góðar. Tað sigur stjórin, Dan Thomsen, sum framvegis eigur 60% av partapeninginum í felagnum. Hann leggur dent á, at Trolvirkið Bergið og Vónin verða rikin sum tvey sjálvstøðug virkir – við hvør sínari leiðslu**



TROLVIRKIÐ BERGIÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sp/F Trolvirkið Bergið í Hvalba hevur tilsamans 18 ár á baki. Tað vóru Norðberg-menninir við Janusi Norðberg á odda, sum í síni tíð fóru undir hetta virksemið, men fyri 10 árum síðan keyptu Dan Thomsen og Bogi Mortensen felagið. Fyri fimm árum síðan keypti Dan eisini partin hjá Boga, og síðan hevur Dan Thomsen verið einsamallur eigari av virkseminum.

Fyrst í hesum árinum vórðu eigaraviðurskiftini í felagnum aftur broytt, og hesaferð var tað P/F Vónin, sum keypti 40% av partapeninginum, meðan Dan framvegis eigur tey 60%.

Trolvirkið Bergið í Hvalba er soleiðis ein partur av Vónin Group í dag, men verður burtur av rikið úr Suðuroy – meira og minni sum ein familjufyritøka.

Dan Thomsen er stjóri í felagnum, meðan sonur hansara, Regin Thomsen, tekur sær av tí fíggjarliga partinum, eitt nú innkeypi og sølu.

### Djúpvatnstrolarar

- Tað eru serliga djúpvatnstrolararnir í oynni, sum eru og hava verið ein stórur partur av grundarlagnum undir virkinum, men vit hava eisini framleitt trol til teir smáu trolbátarnar og til partrolarar. Ein partur av okkara framleiðslu er seldur norður um Suðuroyarfjørð, eitt nú í Vágar og aðrastaðni. Aftrat hesum hava vit eisini selt okkurt trol niður til Danmarkar, sum føroyingar, ið sigla har niðri, hava umbiðið. Hetta eru trol til smáar trolbátar, og vit hava skilt, at teir eru ógvuliga væl nøgdir við reiðskapin, sum vit hava latið teimum.

Stjórin, Dan Thomsen, sigur, at tá ið felagið luttók á Fish Fair í Havn næstsíðsta summar, vitjaðu nógv fólk inni á básinum.

- Nógvir spurdu seg fyri um okkara trol, og tað vóru eisini teir, sum bíløgdu trol hjá okkum á sjálvari stevnuni, sigur hann.

### Klaga ikki

Stjórin sigur, at søla av trolreiðskapi í ein ávísan mun er knýtt at árstíðini, men hann heldur fyri, at teir ikki skulu klaga.

- Vit hava havt nógv at gera – og hava verið væl koyrandi her suðuri, sum hann tekur til.

Spurdur, hvussu tað ber til, at tað hevur gingið so væl at hildið upp á bátarnar í oynni, nú ikki færri enn tvey trolvirki norðanfjørðs kappast sínámillum - og við lutfalsliga lítla virkið í Hvalba, sigur hann:

- Jú, eg skilji ógvuliga væl teir, sum eiga hesi skipini. Suðuroyggin liggur burtur frá hinum oyggjunum, og her kunnu skipini fáa ta tænastu, sum tey ynskja sær – og tá ið tey ynskja hana.

Hann vísir á, at teir, sum reka Trolvirkið Bergið, altíð eru tøkir til hjálpar, tá ið tað er neyðugt, bæði vanligar gerandisdagar, leygardagar og sunnudagar.

- Skipini kunnu altíð ringja til okkara og siga, at tey hava gloymt hetta ella hatta – ella hava brúk fyri eini ella aðrari hjálp, og so gera vit tað, sum liggur í okkara makt fyri at hjálpa teimum avstað aftur. Jú, tað er avgjørt ein fyrimunur fyri trolaraflotan her í oynni, at Trolvirkið Bergið er í Hvalba.